

# Statoil koyrir 2000 starvsfólk afturat

**Jógvan Hugo Gardar**

12.06.2015 - 08:50

Oljan.fo

Norska oljufelagið Statoil skal noyðist at siga 1500 starvsfólkum úr starvi, umframt 500 sum eru í fyribilsstørvum hjá felagnum. Hetta skrivar Dagens Næringsliv í morgun.

Fundur var millum leiðsluna og fakfeløgini í gjár, og semjan sum partarnir komu til er at 2000 størv skulu burtur. Við hesum er størsta skerjingin hjá Statoil nakrantíð veruleiki.

Sambært Dagens Næringsliv skulu starvsfólkini fáa kunning um avgerðina um stutta tíð, men Jannik Lindbæk, kunningarstjóri hjá Statoil vil ikki vátta at partarnir eru komnir til eina semju, skrivar Dagens Næringsliv.

Hetta farna árið eru 1950 starvsfólk søgd úr starvi hjá Statoil. Farnu mánaðirnar hava fleiri bólkar sitið og mett hvussu Statoil kann spara enn meir, nú oljuprísurin leggur trýst á allan oljuídnaðin. Tað arbeiða í dag eini 12.000 verkfrøðingar hjá Statoil, og ætlanin er at skerja hetta talið, og málið er at tað skal vera gjørt áðrenn 1. januar 2017